


og alt annað kanska liggur úr 1.500 upp í 3.500 krónur um mánaðin.

- Um skúlin er fyri øll, eigur hann eisini at taka atlit til, at øll hava ikki ráð til at ferðast við skúlanum. Hetta er eitt mál, sum skúlamyndugleikarnir áttu at hugt nærri at, segði Siri Hansen á fundinum í Miðlahúsinum mikukvøldið.

Eisini í sambandi við onnur sosial tiltøk eru hesi børnini við sviðusoð. Til dømis í sambandið við føðingardagar, har skúlin viðhvørt hevur eina reglu um, at allur flokkurin skal verða boðin í føðingardag. Øll hava ikki ráð at bjóða so nógvum børnum, men til dømis bara dreingirnar.

### Ikki ráð til føðingardagar

Eitt er at halda føðingardagar. Eitt annað er at luttaka í føðingardøgum ella konfirmatiónum, har tú hevur gávu við. Hetta kann eisini vera ein tyngjandi postur í fíggjarætlanini, og kann avleiðingin lættliga vera, at børnini ella familjan meldar avboð.

*- .. eg droppaði konfirmatiónirnar í ár, tí eg hevði ikki ráð, sigur ein mamma í kann-ingini.*

Avleiðingin av hesum kann vera, at frammanundan sperdu familjurnar isolera seg. Og tað er serliga óheppið, tí tað frammanundan er avmarkað, hvussu nógv stakir uppihaldarar koma út millum onnur fólk.

### Ikki bíligari á bygd

Í kanningini um stakar uppihaldarar verða fleiri mytur um stakar uppihaldarar avlívaðar. Ein teirra er, at tað er nógv bíligari at búgva úti á bygd, um tú ert fátækur. Her siga tær báðar, at veruleikin er, at støku uppihaldararnir úti á bygd hava akkurát líka lítið eftir, tá alt er goldið, sum tey á stórplássum. Hetta kemst ofta av, at neyðugt er at hava bil fyri at koyra millum bústað, ansingarstovn og arbeiði, og busssambandið er ov óreglulig.

### Danska alternativið

At Danmark altíð er eitt alternativ til stokkutu tilveruna í Føroyum er ein veruleiki, sum vit ikki koma uttanum. Í hesum sambandi vísa tær báðar á, at viðurskiftini í Føroyum eru fleiri ferðir verri enn niðri, har veitingarnar sum heild eru hægri, prísstøðið væl lægri, og bústaðarmarknaðurin lagaður til, so hann eisini hóskar til tey, sum ikki fáa játtað bústaðarlán í bankunum og tíansheldur ikki fáa rentustuðul frá landinum.

So samanumtikið er fíggjarliga byrðan nógvar ferðir tyngri her á landi enn í Danmark. Hetta er helst eisini orsøkin til, at so nógvar kvinnur í bestu árum mangla í her á landi, verður sagt.

### Børn við lægri status

Samanumtikið vísa tær báðar, Siri Hansen og Annika Antoniussen á, at støku foreldrini hava ikki so ilt av, at tey sjálvi mangla ymiskt. Tað ringasta er, at børnini líða undir vantandi fíggjarligu orkuni, og at hetta kann ávirka børnini, so tey fáa ikki góðan og fjølbroyttan kost, at tey eiga ting, sum geva status millum hini børnini, umframt, at tað ávirkar børnini sosialt.

Í niðurstøðuni í kanningini vísa tær báðar á, at hesin bólkur í stóran mun er politiskt forsømdur í Føroyum, og at tiltøkini á hesum økinum eru alt ov tilvildarlig. Tær kundu tí hugsað sær ein meira miðvísan sosialpolitikk, sum tók atlit til, at allir føroyingar hava ikki eitt familjunetverk, sum kann lyfta uppgávuna hjá vælferðarsamfelagnum.

Harumframt koma tær við fleiri ítøkiligum uppskotum til politisk tiltøk, sum høvdu bøtt um livikorini hjá støkum uppihaldarum. Vit kunnu tríva í nøkur teirra: Bústaðarpolitikkurin, ella mangulin upp á sama, her á landi. Barnapeningurin, ið kundi verið hægri, tá hugsað verður um, at eitt barn í miðal kostar einar 4.000 kr. um mánaðin. Tey 40 prosentini, sum hitt foreldrið fær endurgoldið fyri goldnan barnapening, kundi farið til barnið. Markið fyri at fáa rætt til fríplass kundi verið minkað, og barnafrádrátturin kundi verið hækkaður. Harumframt er ein stórur sosialpolitiskur trupulleiki her á landi, at hvørki vitan ella gransking er nøktandi, og at hetta økið eigur at verða útbygt sum skjótast.

# Nýggjar íbúðir hjálpa støkum uppihaldarum

## STAKIR UPPIHALDARAR

**Landsstýrið setir sítt álit á, at nógv umrøddi bústaðarpakkin fer at gera tað møguligt at bøta um størstu trupulleikarnar hjá støkum uppihaldarum og øðrum bólkum. Men ongin veit enn, nær bústaðarpakkin kemur**

Áki Bertholdsen

Største trupulleikin hjá støkum uppihaldarum er, at tað er alt ov dýrt at fáa nakað ordiligt at búgva í fyri ein prís, sum teir hava ráð at gjalda.

Hetta verður staðfest í kanningini, sum tær báðar, Annika Anthoniussen og Siri Hansen, løgdu fram í Miðlahúsinum mikukvøldið.

Hesum er Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum samd í.

- Stakir uppihaldarar hava tað alt annað enn gott. Og tað, sum er mest átrokandi er, at teir og aðrir bólkar í samfelagnum, fáa ordiligt tak yvir høvdið, ásannar hon.

Tær íbúðir, ella tey hús, sum stakir uppihaldarar og onnur hava ráð at fáa sær nú, eru mangan í ringum standi, tí tey hava ikki ráð at betala tað, sum tær góðu íbúðirnar og tey góðu húsini kosta at leiga og enn minni, hvat tey kosta at byggja ella keypa.

Og so kemur ótryggleikin, sum leigarar støðugt eru í við tað, at teir altíð kunnu verða uppsagdir við stuttari ávaring.

### Hvørki í dag ella í morgin

Spurningurin er so, hvussu Rósa Samuelsen ætlar at loysa trupulleikan tað er at útvega bústaðir, tey hava ráð at gjalda.

Tað hava vit spurt hana um, men tað skilst á svarinum, at tað verður hvørki í dag ella í morgin, at ein loysn er á veg.

Men landsstýriskvinnan er sannførd um, at fyri stakar uppihaldarar og aðrar bólkar í samfelagnum, er svarið at útvega leiguíbúðir.

Og hon heldur eisini, at tað skal gerast ígjøgnum bústaðarpakkan, sum er á veg.

Bústaðarpakkin hevur verið á veg í mong ár, men Rósa Samuelsen vónar nú, at hann kann verða klárur at leggja fyri tingið einaferð hetta næsta árið.

- Bústaðarpakkin fevnir um lutaíbúðir, men tað kostar eisini nógvan pening at seta seg fyri eina lutaíbúð, hóast tey, sum byggja, fáa mvg afturrindað og fáa rentustuðul.

### Skulu røkka saman

Landsstýriskvinnan sigur, at tað, sum er alt avgerðandi er, at tey, sum skulu búgva í íbúðini, eisini fáa endarnar at røkka saman fíggjarliga.

Hon heldur tí, at tað er neyðugt at stakir uppihaldarar og aðrir bólkar, eisini kunnu fáa umstøður at leiga sær eina góða íbúð, uttan at hava ábyrgdina av umvælingum og uttan at hugsa um rentur og avdrátt.

- Bara soleiðis ber tað til at fáa endarnar at røkka saman, so at tey framvegis fáa fíggjarligt frælsi at forsyrgja sínum børnum á einum nøktandi støði.

Tey fara eisini at kanna eftir, hvussu leiguíbúðir kunnu verða umfataðar av bústaðarpakkanum og so verður eisini neyðugt at gera neyðuga lógargrundarlagið, so at tað ber til hjá kommunum, íbúðarfeløgum, felagsskapum, fakfeløgum ella hvør tað skal vera, at byggja leiguíbúðir.

- Hetta er tað einstaka tiltakið, sum hevði munað best sigur Rósa Samuelsen.

aki@sosialurin.fo

# Skulu betala helvt um helvt

Tað kostar einar 4450 krónur um mánaðin um mánaðin at forsyrgja einum barni í barnagarðsaldri.

Tað er ein niðurstøða í kanningini, sum Annika Anthoniussen og Siri Hansen, løgdu fram í Miðlahúsinum mikukvøldið.

Og í orðaskiftinum um umstøðurnar hjá støkum uppihaldarum, var tað ein áhoyrari, sum skeyt upp, at hendan upphæddin skuldi býtast í tvey, so at mamman og pápin betaltu hvør sína helvt.

Uppskotið fekk undir tøku á fundinum, tí fólk síggja ikki meiningina í, at útreiðslurnar til barnið skulu vera so ójavnt býtt ímillum foreldrini, har tann, sum hevur barnið, hongur upp á nógv tann størsta partin av rokningini.

Tann, at foreldrunum, sum ikki hevur barnið, men sum betalir barnapengar, fær ein part endurgoldið frá landinum.

Eitt ítøkiligt uppskot á fundinum var, at afturberingin skal halda uppat, men at hon ístaðin skal fylgja barninum.

-Tað er í øllum førum eitt uppskot sum hevði bøtt munandi um umstøðurnar hjá støkum uppihaldarum uttan at tað hevði kostað landinum eitt oyra.

Tað varð eisini fýlst á, at hjá teimum støku uppihaldarunum, sum fáa forsorgarhjálp, verður barnafrádrátturin mótroknaður.

Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, sigur, at hetta er spurningar, sum mann kann hyggja upp á, nú forsorgarlógin skal broytast.

# Fátækir føroyingar skulu finnast

Landsstýrið arbeiðir nú við at áseta eitt fátækamark, so at tað ber til at siga, hvørjir føroyingar eru beinleiðis fátækir.

Tað upplýsti Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum í Løgtinginum mikudagin.

Mikkjal Sørensen, sum í løtuni er tingmaður fyri Javnaðarflokkin, spurdi hana um vit nakað formligt fátækamark er ásett í Føroyum.

Hann heldur, at tað er neyðugt at hava eitt formligt fátækamark fyri at hava nakað ítøkiligt at halda seg til. Hann heldur, at tað er ein fortreyt fyri at tað skal bera til at taka tær røttu politisku avgerðirnar og fyri at tryggja, at fólk hava pening at liva fyri.

Hesum er landsstýriskvinnan samd í.

Hon sigur, at vit hava onki formligt fátækamark í Føroyum, men higartil hevur grundarupphæddin hjá fyritíðarpensjónistum verið brúkt sum mark fyri, hvussu nógv fólk í minsta lagi skulu hava at liva fyri um mánaðin.

- Men tað er ongin ivi um, at eitt fátækamark má ásetast í Føroyum, staðfestir hon.

Hon leggur afturat, at umsitingin í almannamálaráðnum er farin at roknað seg fram til, hvar hetta markið skal vera.

- Hetta er serliga neyðugt tá ið hugsað verður um livikorini hjá støkum uppihaldarum, legði hon afturat. Men tað er eisini neyðugt, tá ið hugsað verður um barnafamiljur og um aðrar bólkar í samfelagnum.

Í framløgu síni í Miðlahúsinum mikukvøldið, vístu Annika Anthoniussen og Siri Hansen, á, at Almannastovan metir, at eitt fólk skal hava 4500 krónur um mánaðin til at fastar útreiðslur.